gult18 cyan18 magenta18 svart18

Róðrarfólkið fær ov lítið burturúr

– í fótbóltinum kappast tey átjan vikuskifti í landskappingini, og harafturat spæla teir nógvar dystir í steypakappingini. Eg dugi ikki at síggja tann stóra munin, sigur Martin Venned millum annað

Mynd: Eyðun Klakstein

FM róðrar áttu á hvørjum ári at verið í góðu róðrarplássunum á Skálafjørðinum, Kollafirði og eisini Fuglafirði og onkra aðra staðni við, heldur royndur kappróðrarmaður

KAPPRÓÐUR

Jóannes Hansen

Eitt uppskot liggur hjá Róðrarsambandinum um, at kappróðurin á eystanstevnuni og kappróðurin á varmakeldustevnu skulu telja við í FM kappingini á hvørjum ári. Nógvu tey seinastu árini hevur tað verið soleiðis, at annaðhvørt ár hevur stevnan á Skálafjørðinum talt við, og annaðhvørt ár hevur stevnan í Fuglafirði talt við. Í ár taldi stevnan í Runavík ikki við, meðan róðurin á varmakeldu, sum verður leygardagin, fer at telja við. Uppskotið um at FM, at FM róðrarnir í framtíðini skulu vera sjey og ikki seks, fer at verða viðgjørt í heyst.

Martin Venned hevur nógvar royndir í kappróðri. Tey seinastu árini er hann vorðin kendur fyri, at tað var hann, sum var rógvandi venjari – um tað ber til at siga tað soleiðis – umborð á Eysturoyinginum, sum vann allar róðrarnar í 1998 og í 1999. Og nú hevur hann sama leiklut umborð á Nevinum Reyða í Klaksvík, umfram at hann hevur lagt venjingina til rættis hjá øllum hinum manningunum hjá Klaksvíkar Róðrarfelag.

Martin Venned vónar, at kappróðrarfeløgini fara at taka undir við uppskotinum um, at Runavík og Fuglafjørður skulu telja við á hvørjum ári, og stendur tað til hansara, so skal tað arbeiðast við, at uppaftur fleiri róðrar skulu telja við enn tær seks stevnurnar, sum higartil hava gjørt tað og so ein afturat:

– Í kappróðri hava líkindini nógv at siga. Hvussu líkindini eru, er sjálvandi fyrst og fremst treytað av, hvussu veðrið er. Tað kunnu vit einki gera við. Men umstøðurnar annars hava eisini nógv at siga, og tað er í tí sambandinum, at eg haldi, at tað er spell, at tað ikki verður róð kapp á hvørjum ári í nøkrum av bestu økjunum.

Hvat hugsar tú um?

– Fyri tað fyrsta er tað burturvið, at Skálafjørðurin, sum ivaleyst er besta róðrarøkið í landinum, ikki telur við á hvørjum ári. Tað er eisini gott, at Fuglafjørður kemur afturat hvørja ferð. Kollafjørður er góður at rógva á, og tað hevði verið upplagt, at tað var FM kappróður á Kollafirði á hvørjum ári.

Men tað er ein skipan, har stevnurnar skifta ímillum bygdirnar í Sundalagnum?

– Tað ber væl til, at tann skipanin heldur fram, og at tað harumframt er FM róður á Kollafirði. Eg haldi ikki, at tað til allar tíðir nýtist at vera ein óbroytiligur veruleiki, at kappróðurin bara hoyrir saman við summarstevnunum, sum tað sjálvsagt er eitt stórt arbeiði hjá fyrireikarunum at fáa í lag.

Lítil úrtøka

Martin Venned vísir á, at nú er tað vanligt, at kappróðrarfólkið stutt eftir ársskiftið fer undir fyrireikingarnar til nýggja róðrarárið, og hann heldur, at tað er alt ov lítið bara at kappast í seks FM kappingum:

– Um vit sammeta við t. d. fótbóltin, so fara teir undir sínar fyrireikingar umleið somu tíð, sum vit róðrarfólk fara undir okkara fyrireikingar. Viðhvørt hoyra vit, at tað verður alt ov nógv hjá kappróðrinum at kappast næstan hvørt vikuskifti. Men í fótbóltinum kappast tey átjan vikuskifti í landskappingini, og harafturat spæla teir nógvar dystir í steypakappingini. Eg dugi ikki at síggja tann stóra munin.

Styrkja norðoyarstevnuróðurin

Martin Venned heldur, at tað átti at verið arbeitt við, at umstøðurnar at rógva kapp á norðoyarstevnu vóru tær somu, sum tær eru á hinum stevnunum:

– Eg haldi – og eg rokni við, at kappróðrarfólk yvirhøvur eru samd við mær í tí – at tað er spell, at bátarnir ikki eru plaseraðir soleiðis á norðoyarstevnu, sum teir eru á hinum stevnunum. Um vit skulu sleppa undan lutakastinum á norðoyarstevnu og í staðin fáa bátarnar at liggja soleiðis, at teir stinnastu liggja í miðjuni, so eigur ein ella onnur undankapping at vera, soleiðis at bátarnir kvalifisera seg til plássini á norðoyarstevnu.

Hvussu skuldi tað gingið fyri seg?

– Bæði á Skála og á Strondum eru bygdarstevnur stutt undan norðoyarstevnuni. Manningarnar leggja stóran týdning í hesar stevnurnar, tí tær eru síðsta royndin undan norðoyarstevnuni. Onnur stevnan kundi gott verið ein FM róður, og tað hevði kanska verið eitt uppskot, at hin stevnan varð brúkt sum kvalifisering til fyrsta FM stevnuna. Tað vil siga, at teir bátarnir, sum vóru fremstir á tí stevnuni, lógu í miðjuni í fyrstu FM kappingini. Bátarnir, sum ikki høvdu tikið lut í tí stevnuni, høvdu sjálvandi ligið ytstir í fyrsta FM róðrinum. Hetta hevði sjálvandi økt um áhugan at vera við í hesi stevnuni.

Nú ert tú rættuliga bitin av kappróðrinum. Hevur tú ikki hugsað um, at ein vandi í at spenna bogan so høgt, sum tú ert inni á, hevði verið, at tað hevði tikið luftina úr nógvum, sum rógva og teimum, sum skipa fyri?

– Tað haldi eg ikki. Umstøðurnar eru so ógvuliga nógv broyttar í Føroyum, síðani kappróðurin varð skipaður í tí líki, sum vit kenna hann. Tað er nógv minni enn ein hálv øld síðani, og FM kappingin, sum vit kenna hana, hevur bara verið galdandi síðani 1973. Samferðslumynstrið er vera nógv betrað. Tað eru ikki so nógv ár síðani, at hvørt felag fyri seg skuldi skipa fyri ferðingini til og frá kappróðrinum. Nú er samferðslan so mikið góð, at vit síðsta leygardag kundu fara úr Klaksvík, og vit vóru aftur á vánni fyri midnátt. Bátarnar høvdu vit í bilum, so tað var ómakaleyst, tá sammett verður við, hvussu tað áður hevur verið.

– Fyrireikingarnar til og avgreiðslan av kappróðrinum eru nógv betrað tey seinastu árini. Eg rokni avgjørt við, at tey flestu, sum hava við kappróður at gera, eru samd við mær, og eg vóni, at framburðurin, sum hevur verið tey seinastu árini, í næstu framtíð fer at síggjast aftur í fleiri kappingum.

Uppií í fjórðings øld

Tað er ein kappróðrarmaður við heilt nógvum royndum, sum vit hava tosað við. Martin Venned sigur okkum, at hann var bara níggju ára gamal, tá hann fyrstu ferð stýrdi Fípuni Føgru, og tað er ein fjórðings øld síðani:

– Eg gekk altíð í neystinum, tá teir vandu. Beiggi mín, sum eisini rør við Nevinum Reyða og sum er og stívliga tvey ár eldri enn eg, stýrdi hjá teimum. Men hann plágaðist av høvuðpínu, tá hann stýrdi og skuldi rópa, og so bóðu teir meg. Foreldrini góvu loyvi til tað, tá ein av rógvarunum segði, at hann skuldi taka ábyrgdina, og síðani havi eg næstan á hvørjum ári verið við. Nøkur ár setti eg svimjingina og oyggjaleikirnar framum, men hevur kappróðurin aftur verið fremstur í nøkur ár.

Í 1997 róði Martin við Kjøli hjá kollfirðingum. Tá búði hann í Søldarfirði. Hann heldur, at tað var bátasmiðurin, Sámal Hansen, sum hevði víst teimum í Kollafirði á seg. Í 1998 og í 1999 var hann við nýggja Eysturoyingi, sum vann allar róðrarnar. Í fyrraárið flutti hann til Klaksvíkar, og tað kann ikki sigast annað, enn at tað hevur hilnast væl í kappróðrinum har norðuri.

Vit hava tosað við Martin Venned, sum er ein av mongum sera nærlagdum og ídnum kappróðrarfólkum. Kanska fara vit í komandi bløðum at frætta meiri um hesi viðurskiftini.

gult19 cyan19 magenta19 svart19

Eystari armurin betri enn tann vestari

Ábendingar eru um, at tríggir bátar fara at kappast um sigrarnar í komandi róðrunum

6–MANNAFØR MENN

Jóannes Hansen

Sammett við norðoyarstevnuna var tað bara ein nýggjur vinnari í kappróðrinum á jóansøku. Tað vóru menninir umborð á Sølmundi, sum vunnu, men tað er synd at siga, at nógvir av teimum, sum mannaðu vinnarabátin, ikki hava smakkað rákan av at vinna áður. Fýra av ungu monnunum vóru í fjør við Tjaldrinum, sum vann allar róðrarnar.

Petur Hansen, sum er annar av toftimonnunum, er bátsformaður. Hann er ein av teimum, sum í fjør vóru við til at vinna róðrarfelagnum NSÍ so nógvar sigrar. Undir liðini á sær hevur hann Tummas R. Olsen, sum í fjør var við gamla Tjaldrinum, sum nú eitur Spógvin. Í rúminum sita Gudmund Danielsen og Jóhan Ásmund. Teir vóru báðir við Tjaldrinum í fjør. Á lærinum sita Johnnie Lamhauge og Ólavur Magnus Lamhauge. Hin fyrri var við Spógvanum í fjør, og hin seinni var við Tjaldrinum.

Hetta eru róðrarmenn í besta aldri. Teir eru allir átjan ára gamlir. Miðalaldurin er kortini eitt sindur hægri. Róðursmaðurin eitur Jákup Vágsheyg. Hann er 28 ára gamal og stýrdi Spógvanum ein part av róðrarárinum í fjør.

Tá vit spyrja bátsformannin, um tað kom óvart á teir, at teir vóru fyrstir um málið á jóansøkuni, so heldur hann ikki:

– Á norðoyarstevnu fylgdust vit leingi við Strál-uni, men so glapp hon frá okkum. Á eystanstevnuni kappaðust vit eisini við Stráluna. Ta ferðina vóru vit undan teimum, so vit høvdu eina vón um, at tað fór at eydnast á jóansøku, sigur Petur Hansen.

Hann roknar við, at kappingin eisini fer at vera spennandi á komandi stevnum:

– Bæði á norðoyarstevnu og á jóansøku var Riddarin væl við á fyrsta teininum. Hesa ferð tóktust teir orka betri, enn teir orkaðu í Klaksvík, og tí kunnu vit rokna við, at teir vera vandamiklir longu leygardagin í Fuglafirði.

Riddarin fekk besta startin á jóansøku. Hann var fremstur fyrstu fimm hundrað metrarnar, men so gingu teir báðir bátarnir á Skálafjørðinum frá honum. Síðani stóð kappingin ímillum eystara armin á fjørðinum og vestara armin á fjørðinum. Tá saman um kom vóru teir á eystara armi drúgvari og vunnu.

Hvessingur hevur vunnið nógv undanfarin ár, men teir megnaðu ikki meiri enn fjórða plássið hesa ferð.

Aftastur var Lómur av Argjum. Hann var tveir minuttir seinni á mál enn vinnandi báturin. Fleiri í Kulum rótum róðu við, og sjálvur Trølla Pætur sat afturi í rong og stýrdi. Men sum kunnugt er tað ikki talið á høvdum, sum ger av hvør vinnur í kappróðri. Tað eru kreftirnar, teknikkurin og taktikkurin. Og í øllum hesum vóru allir hinir betri enn Trølla Pætur og teir!

Klaksvíkin og Runavík ganga undan

Burtursæð frá Havnarbátinum vóru allir hinir vinnarabátarnir úr Klaksvík og Runavík í sera væl eydnaða kappróðrinum á jóansøku

KAPPRÓÐUR

Jóannes Hansen

Róðrarlíkindini vóru tey fagrastu á jóansøku á Tvøroyri. Eitt lítið lot inn eftir fjørðinum hevði við sær, at tað gekk upp á stás at leggja bátarnar. Eingin róður varð skotin av, áðrenn bátarnir komu á mál, og tíðirnar vóru merkisvert góðar.

Tað gingu stívliga tveir tímar frá tí, at fyrsta skotið gelti, og til síðsta 10–mannafarið var komið á mál. Tað ber illa til at ímynda sær, at tað kann ganga skjótari, tá havt verður í huga, at fasti starturin varð fluttur av túsund og út á 1500 metrar, og so aftur úr á 2000 metra málið.

Einasti nýggi vinnarin, tá sammett verður við norðoyarstevnuna, var 6–mannafarið Sølmundur. Á norðoyarstevnu vann Strálan tann róðurin.

Havnarbáturin vann. harvið vardi hann stoltleikan hjá høvuðsstaðnum, og hann var samstundis einasti vinnarabáturin, sum ikki var úr Klaksvík ella úr Runavík. Klaksvíkingar vunnu tríggjar róðrar, og Róðrarfelagið NSÍ vann tvær kappingar.

Í Klaskvík hava tey í nýggjari tíð ikki vunnið í kappróðri. Sigrarnir á norðoyarstevnu vóru í heimasjógvi, og tá bar ikki til at gera nakað burturúr aftaná.

Leygarkvøldið klokkan hálvgum tólv kom Dúgvan í góðveðrinum á vánna við kappróðrarbátunum og manningunum. Sámal Jákup togaði tvær ferðir í floytuna, og so stúgvaðist fólkið saman á Stongunum.

Eftir móttøkuna var kaffi og køkur í róðrarneystinum. Sunnudagin søgdu fleiri, at tey harmaðust um, at tey ikki vistu av hesum. Men onkur helt, at vón er fyri, at tiltakið kann endurtakast.

Fyri fyrstu ferð nakrantíð fóru trailarar leygarkvøldið runt í býnum í Klaksvík. Onkur ilskaðist kanska um, at náttarfriðurin varð órógvaður, men í Klaksvíkar Róðrarfelag halda tey seg vita, at lagið gjørdist betur, tá tey funnu út av, at tað vóru glaðir kappróðrarar, sum vóru upp á spæl.

Næsti FM róðurin verður í Fuglafirði leygardagin.

Pisurnar umborð á Páll Fanga í serflokki

Sølmundur tykist vera einasta hóttanin ímóti bátinum úr Klaksvík, meðan kappingin um bronsuplássið er stór

6–MANNAFØR KVINNUR

Jóannes Hansen

Í dag eru síðstu HF næmingarnir í Klaksvík til próvtøku. Fyrrapartin í morgin verða próvgini handað. Hesa ferð verður tað í Skálanum og ikki í HF skúlanum. Orsøkin er tann, at næmingatalið, sum fær prógv í ár, er væl størri, enn tað hevur verið nógvu tey seinastu árini.

Millum glaðu HFararnar í Klaksvík eru tríggjar gentur, sum saman við bátsfelagnum umborð á Páll Fanga í hesum døgum teljast millum stoltleikan hjá klaksvíkingum og norðoyingum.

Eftir at tær í dag hava fingið prógvini frá Sigruni Skálagarð, sum er leiðari á HF skúlanum, kunnu tær sleppa øllum prógvtøkustríðnum og bara hugsa um næstu uppgávuna, sum stendur fyri framman. Tað er varmakelduróðurin í Fuglafirði.

Um vit nýta tær báðu kappingarnar higartil sum grundarlag, so bendir alt á, at Páll Fangi enn eina ferð verður fyrstur um málið, tá húgvuklæddu ungu kvinnurnar fara um Leirvíksfjørð og til Fuglafirðar.

Á Tvøroyri var eingin ivi. Páll Fangi skraddi seg beinanvegin eina hálva bátslongd framum hinar bátarnar, og so snúði tað seg bara um at halda eyga við Sølmundi.

NSÍ kvinnurnar gjørdu onkra lítla roynd at bjóða av, men tær fingu krakk hvørja ferð, og so tóktist tað rættuliga skjótt sum um tær vóru nøgdar við næstfremsta plássið. Tað vil siga, at tað ongantíð gjørdist rættulig kapping um fremsta plássið. Páll Fangi var eina góða bátslongd fremst, og Sølmundur var tvær bátslongdir framman fyri bronsuplássið.

Haraftúrímóti var kappingin um triðja plássið øgilig. Havnarbátarnir Jarnbardur og Gongurólvur komu so at siga í senn á mál. Jarnbardur var drúgvastur í tí kappingini. Eftir róðurin vísti tað seg, at ein av teimum umborð á Gongurólvi hevði róð við brotnari ár. Á fyrstu metrunum vóru tær komnar í fløkju við Víkingin, og tað hevði ivaleyst kostað í endaligu uppgerðini.

Klaksvíksgentur vóru aftur fagrast

Fípan Fagra vann enn eina ferð í stórum stíli. Vágagenturnar tykjast ætla sær at vera við í kappingini á komandi stevnum

5–MANNAFØR GENTUR

Jóannes Hansen

Fípan Fagra var sannførandi í heimasjógvi, og hon var eins sannførandi, tá tær kappaðust á jóansøku. Á málinum var munurin aftur til Síliið úr Havn væl meiri enn ein bátslongd. Fípan Fagra var fremst, tá startspurturin var av, og tær stýrdu allari kappingini upp á fremsta plássið.

Stórur spenningur var um næstu plássini. Høvuðsstaðarbátarnir Síliið og Blikur fóru so at siga í senn um málstrikuna, men Síliið var frammanfyri. Blikur var ikki leysur av Tjaldrinum, men so var munurin stórur aftur til seinasta bátarin.

Undanfarin ár hava bátarnir í Vágum verið sera eyðsýndir í hesari kappingini. Men higartil í ár hevur einki ligið fyri, hvørki hjá Ørnini ella hjá Frúnni.

Á jóansøku vóru kortini ábendingar um, at tað kanska fer at hilnast eitt sindur betur á komandi stevnum, enn tað hevur gjørt higartil hjá vágabátunum. Bæði Ørnin og Frúgvin vóru aftarlaga eftir fyrstu metrarnar, men báðir bátarnir arbeiddu seg upp og teir fingu báðir stig.

Merkisvert var tað eisini í hesari kappingini, at báturin hjá vestmenningum royndist so illa.